# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo



# EIN FLOKKUR Í SPØNUM

Nú stendur á gomlum nøglum hjá Javnaðarflokkinum. Ikki síðani 1932 hevur Javnaðarflokkurin fingið so lítla undirtøku, sum flokkurin hevur í dagsins veljarakanning. Og ikki síðani 1936 hevur Sambandsflokkurin havt størri undirtøku, enn hann hevur í dagsins veljarakanning.

Fyri Javnaðarflokkin er katastrofan so stór, at um flokkurin ikki ger onkrar grundleggjandi broytingar her og nú, so kann hann tað sama pakka saman. Tað hevur so at siga bara gingið afturá hjá flokkinum, síðani Jóannes Eidesgaard tók við sum formaður. Hann megnaði í 1998 at knúgva flokkin upp úr díkinum frá 1994, men síðani hevur bara gingið aftur – og flokkurin hevur havt trý vánalig val á rað. Tað er ikki hent áður í søgu floksins, og sambært dagsins veljarakanning, so stendur flokkurin til at tapa fjórða valið – og tað verður ikki við mýkindum – hann stendur til at missa 6,4 prosent og tvey tingfólk.



Støðan hjá Javnaðarflokkinum er nógv verri í dag, enn tá Atli Dam í 1994 fekk alla skuldina einsamallur. Nógvar ferðir verri. Flokkurin er sambært veljarakanningini á støðd við Sjálvstýrisflokkin og Miðflokkin, meðan hann síðani 1936 hevur verið millum teir stóru flokkarnar. Í 1994 fór Javnaðarflokkurin í knús, tí at javnaðarfólk og fakfelagsfólk stovnaðu ein nýggjan flokk. Nú flýggja veljararnir mest til Sambandsflokkin, sum uttan at hava víst á úrslit ella gott politiskt handalag skúmar róman - helst við trygd í blokki og móðir Danmark.

At Fólkaflokkurin stendur fyri einum bakkasti er ikki so løgið. Flokkurin hevur júst mist ein av profilunum, og tveir av fremstu monnunum í flokkinum eru undir tí álvarsligastu ákæru, sum ein politikari kann fáa.

Tjóðveldisflokkurin kvinkar fram. Flokkurin hevur gingið oyðumarkargongd síðani hann gav fullveldissamgonguni mønustingin fyri sjey árum síðani. Og við einum miseydnaðum fullveldispolitikki verður helst trupult hjá flokkinum at vinna seg fram aftur í fremstu røð, men seigur er hann - og tykist megna at halda støðuna sum alternativið til stjórnarberandi flokkin. Hann tykist onkran stirðil hava, sum Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin ikki hava.

Tað er ringt hjá Jóannes Eidesgaard at forklára seg úr støðuni. At skylda uppá, at tey ikki duga at selja boðskapin, tað gongur ikki - tað er ov býtt. Tað er sum tá Eik-stjórin umbar seg við, at hann hevði fylgt strategiini - og annars einki galið gjørt. Men for ólukkan. Strategiin hjá Eik var skeiv, eins og politikkurin hjá Javnaðarflokkinum er skeivur.

Trý vánalig val. Sjey søguliga vánaligar veljarakanningar. Er tað ikki nóg týðuligt tekin um, at nýggj fólk mugu á liðið?

## » Eidesgaard stendur til at tapa fjórða valið á rað

---

## Fólkaflokkur mergsýgur Javnaðarflokk

Javnaðarflokkurin hevur ikki góðar royndir av at samstarva við Fólkaflokkin. Í øllum førum, um vit hyggja eftir valúrslitunum.

Síðani heimarstýrislógina hevur Javnaðarflokkurin verið í 12 samgongum, sum hava sitið í 11 ymsum valskeiðum. Tvær ferðir eru samgongurnar broyttar. Fyrra ferðin var, tá Fólkaflokkurin varð koyrdur úr tvíflokkasamgonguni við Javnaðarflokkin í 1993, seinna ferðin, tá Tjóðveldi varð koyrt úr CHE samgonguni, og onnur ABC samgongan varð skipað.

Men tað sum eyðkennir samstarvið millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin er, at Javnaðarflokkurin missir atkvøður.



Tíðindablaðið
sosialurin
5 ferðir um vikuna
Nr. 186 ★ týsdagur 20. november 1990

Atli Dam um samgongufyrireiking:

**Einki at bíða eftir**

**Stórsigur**

Atkvøðubýtið í prosentum 1988 og 1990

**Persónligu atkvøðutølini**

Finnbogi Ísakson:

**Lyftini telja meira enn politikkurin**

Jógvan Sundstein:

**Vit høvdu eitt gott val**

*Í 1990 vann Javnaðarflokkurin stórsigur og fekk 10 tingfólk. Tá fór flokkurin í samgongu við Fólkaflokkin, sum vardi til 1993. Á valinum í 1994 leið Javnaðarflokkurin ein knúsandi ósigur og misti fimm tingfólk*

Í valskeiðunum frá 1974 til 1980 var Javnaðarflokkurin í samgongu við Fólkaflokkin og Tjóðveldi. Tá misti Javnaðarflokkurin atkvøður til Sambandsflokkin. Aftur-gongdin var um fýra prosent hesi árini.

Eftir samgonguna við Fólkaflokkin frá 1991 - sum tó seinni varð til samgongu við Tjóðveldi og Sjálvstýrisflokkin, hevði Javnaðarflokkurin sína higartil størstu afturgongd - hann misti 12,2 prosent.

Eftir fyrru ABC samgonguna misti Javnaðarflokkurin 2,5 prosent, og nú tann seinna ABC samgongan syngur síðsta vers stendur Javnaðarflokkurin til at missa 6,7 prosent.

Sostatt kunnu vit - út frá hagtølunum - staðfesta, at Javnaðarflokkurin missur nógvar atkvøður av at samstarva við Fólkaflokkin.

Ella sum Jóannes Eidesgaard segði á landsfundinum herfyri:

*- Vit eru í einum borgarligum mjørkatámi, sum ger tað trupult hjá okkara fólki at kenna okkum aftur...*

Tað tolir Javnaðarflokkurin eftir øllum at døma ikki.

---



## » Pisa dómur yvir politisku skipanina

SJÚRUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 14



## » Eldraøkið í Havn mennast

HALLA SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 17

---

## Samtak: Uppskotið ikki nóg gott



Samtak heldur, at uppskotið um minstuløn hjá sjófólki er ikki nóg gott í verandi líki. Ein nýggj skipan er ikki klár at seta í verk, tí skil átti løgtingið at felt uppskotini við triðju viðgerð. Á hendan hátt tryggjar løgtingið, at sjófólk ikki fara óneyðuga nógv niður í løn.

Tað heldur Samtak.

Undir aðru viðgerð í gjár atkvøddi ein stórur meiriluti av løgtinginum fyri at avtaka minstulønarskipanina, og at seta í verk trygdargrunn fyri sjófólk.

Tað hevur við sær, at minstulønin, sum landið higartil hevur fíggjað, er burtur. Sjófólk og reiðarar skulu heldur rinda minstulønina, tá ein túrur hilnast illa.

Verða uppskotini um minstulønina og trygdargrunnin samtykt í verandi líki til triðju og seinastu viðgerð, merkir tað, at sjófólk lækka nakrar túsund krónur í løn um árið. Tað velst um, hvussu stór lønarhækkingin er um býtisprosentið í sáttmálanum millum fiskimannafelagið og reiðarafelagið, og um hvussu stór inntøkan er.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*